

*– Eg plagdi at siga, at eg bara seymaði sovorðið óneyðuga pent. Men tað er nakað tvætl at siga, tí tað vakra kann lyfta eitt dapurt sinn og soleiðis gera stóra nýttu, sigur Rannvá Simonsen, sum arbeiðir sum sniðgevi í Norður Kanada*

fyri skinnini. Men tað tykist eitt sindur tápuligt, at eg verði noydd at fara allan vegin til Montreal at keypa eitt skinn frá grannanum hjá mær. Men soleiðis er skipanin. Um veiðimenninir selja skinnini uttan um uppboðssøluna, missa teir stuðulin frá vinnumálaráðnum, og tað hava teir snøgt sagt ikki ráð til, greiðir Rannvá frá.

## Gavst sum arkitektur

Rannvá Simonsen er annars útbúgvin arkitektur frá arkitektskúlanum í Århus. Komin til Norður Kanada í 1997 varnaðist hon, at hugburðurin til kvinnuligar arkitektar var rættiliga nógv øðrvísi, enn hon var von við úr Danmark.

– Tað lá líkasum í luftini, at eitt ungt konufólk skuldi ikki koma her og gera seg klóka uppá slíkt, sum bara rættir byggiharrar høvdu skil fyri. Eg kundi í besta føri fáa onkra lítla uppgávu sum hjálparfólk og so annars tiga fyri rest. Til endans hugsaði eg: Illanstíð, nei! Eg fari ikki at brúka mítt lív uppá at royna at sannføra negativ fólk um, at eg havi nakað at bjóða, sigur Rannvá avgjørd.

At flyta aftur til Føroyar ella Danmark kom ikki upp á tal. Rannvá var nevniliga forelskað upp um bæði oyru og nýgift við manni úr Norður Kanada, og saman vóru tey í ferð við at byggja sína dreymatilveru í lítlu bygdini Nunavut.

Kortini var avgerðin um at gevast sum arkitektur tung at taka, og tað tók henni rúma tíð at koma til sættis við, at tað ikki kundi vera øðrvísi.

– Eg hevði leingi ringa samvitsku yvir ikki at skula brúka mína dreymaútbúgving, sum eg hevði brúkt so langa tíð uppá at fáa. Og eg haldi framvegis, at eg dugi betri at tekna hús enn klæðir. Hinvegin er gleðin við at skapa vøkur pløgg so stór, at hon ríkiliga uppvigar tað, eg møguliga havi mist, sigur Rannvá, sum eisini altíð hevur dámt væl at seyma.

Longu meðan hon las til arkitekt, seymaði hon búnar fyri ymisk sjónleikarhús. Serliga væl dámdi Rannvá at tulka eina søgu gjøgnum pløggini. Í so máta líkist kreativa tilgongdin hjá einum arkitekti og eini seymikonu heilt nógv heldur hon.

– Í báðum førum hevur tú eina uppgávu, sum skal hava eina loysn, sum bæði fungerar og er vøkur. Og gleðin við at síggja títt hugskot blíva til veruleika er líka stór hvørja ferð. Tað er ein ótrúliga nøktandi kensla, sum eg kann liva høgt uppá leingi.

## Kreativ oasa

Eftirspurningurin eftir klæðunum hjá Rannvá er nú so stórur, at hon livir av at vera sniðgevi burturav. Og eftirhondini sum framleiðslan er økt, hevur hon eisini fingið fólk at seyma fyri seg.

– So kann eg savna meg um at raffinera sniðini og menna nýggj hugskot. Tað er eisini tá, eg havi tað allarbest. Kenslan av at sita og skapa okkurt vakurt úr sínum egna hugaheimi er so góð, at hana unni eg øllum, sigur Rannvá.

Seinnu árini hevur Rannvá javnan latið tilfar til eitt kvinnuheim har í nánd, so kvinnurnar har kunnu sita og seyma ymiskt, um tær hava hug.

– Eg havi frætt, at tað hjálpir so væl uppá humørið hjá hesum neyðars bukaðu kvinnunum, tá tær seta seg við seymitoynum. Og eg trúgvi tí væl, tí kreativt arbeiði kann veruliga kennast lekjandi. Øll burdu átt sína egnu lítlu kretivu oasu, sum tey kunnu hvørva inn í, tá tey hava brúk fyri tí, sigur føroyski sniðgevin í Norður Kanada.

*Lagt til rættis: Anna V. Ellingsgaard*
*Myndir: Jens Kristian Vang*
*Styling: Salong Bronx*
*Modell: Gulla Mohr*